# Um fá ár fer oljuframleiðslan í heimin

**Eftirspurningurin eftir olju í heiminum bara veksur og veksur. Samstundis vita vit, at tilfeingið er avmarkað. Ein skjønnan dag fær oljan ein enda. So er uppi. Hvat so?**
**Men áðrenn oljan verður "uppi", so fer eftirspurningurin ikki at kunna mettast av einum útboði, sum um nøkur ár fer at minka. Tá hetta hendir, fer prísurin at hækka stórliga, kanska skjótt upp í 100$ fyri tunnuna. Støðan í heimsbúskapinum verður púra óviss. Eingin dugir fyri vist at siga, hvussu dagurin tekur seg upp**

OLJUVEITING, GEOPOLITISK FOKUS

*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Øll eru tó samd um, at tá ið tað hendir, so skapar hetta problemir í heimsbúskapinum, so skakandi sum higartil ikki hava verið sædd. Politikarar eiga tí longu nú at fyrireika seg til eina broytingartíð, har heimsins avgerandi orkukelda ikki longur er olja. Hvat er at gera? Hvat skal setast í staðin?

## Framskrivingar ella prognosur

Men tað er heldur ikki gjørligt við vissu at siga, nær umskiftið kemur har framleiðslan kemur í hæddina, og síðan fer at minka. Men nógvir persónar, bæði geologar (jarðfrøðingar) og stovnar hava síni boð uppá gongdina fram yvir. Summi spáa, at tað fer at henda um eini 5-10 ár, meðan onnur halda, at tað ikki verður aktuelt fyrr enn um eini 25-50 ár.

Í meira enn 100 ár hava verið spádómar um, nær oljan verður uppi, og næstan alla tíð hava "ekspertar" sagt, um eini 10-20 ár. Tí er kanska ringt at taka ávaringar í álvara nú.

Munurin er tó tann, at fyrr vistu oljufeløg og granskingarstovnar lítið um oljugeologi. Og metodurnar vóru einfaldar og ikki altíð eftirfarandi. Í dag eru leitingaramboðini og vitanin um oljugeologi nógv betri enn fyrr. Framskrivingarnar eru meira eftirfarandi. Amerikanska "Department of Energy" metir at oljuframleiðslan kemur í hæddina í 2016. "World Energy Council" sigur at tað verður onkuntí aftaná 2010. So útlitið í løtuni er eini 5-10 ár aftrat, so hendir okkurt.

## At meta um oljutilfeingi

Tá ætlast skal um oljutilfeingið, sum eftir er, verður talt saman á ymsan hátt. Fyrst keldurnar sum eru í framleiðslu. So keldur sum eru kendar, men enn ikki eru í framleiðslu. At enda ætlaðar, men enn ikki kendar keldur.

Tær størstu keldurnar kallast "super giants", og fleiri av hesum liggja í Miðeystri. Tær seinastu "super giants", sum vóru funnar, komu í 1967-68. Síðani eru ongar veruligar stórar nýggjar keldur funnar.

Um tað loysir seg at pumpa olju upp úr einari keldu, er ein spurningur um teknikk og prís. Tá prísurin er høgur, so kann tað loysa seg at pumpa úr keldum, sum liggja illa fyri. Teknikkurin kann eisini útviklast, so keldur sum fyrr vóru ómøguligar, kunnu brúkast. Hóast bæði oljuprísur og teknikkur gera tað møguligt at pumpa meira upp, so er hetta samband ikki sum eftir einari beinari linju. Geologiin setur mark fyri, hvat ið er gjørligt.

## Eftirspurningur og nýtsla hækkar alsamt

Amerikanska Energy Information Administration væntar at eftirspurningurin eftir olju næstu 20 árini hækkar við 50%. Um ikki stórar nýggjar keldur verða funnar og fara at framleiða olju til marknaðin, so kann framleiðslan ikki longur metta eftirspurningin.

Sjálvt um oljuprísurin síðani oljukreppurnar í 70-unum hevur verið lutfallsliga høgur, og oljufeløgini hava leitað víða hvar seinastu 25 árini, so hava eingi stórvegis úrslit víst seg. Tendensurin hevur stutt sagt verið, at færri og færri nýggjar keldur hava verið funnar.







## Ávístu keldurnar gerast færri

Hetta er víst í kurvumyndini, *mynd 1*. Hon vísir netto-munin millum tær árligu ný-ávístu oljukeldurnar (reserves) og tað árligu nýtsluna av olju í heiminum. Tendensurin í hesi mynd er klárur. Talið kom á sítt hægsta virði mitt í 60-unum, og síðani hevur tendensurin verið fallandi. Síðan miðskeiðis í 80-unum hevur árliga nýtslan verið størri enn tær nýggju keldur, sum eru funnar.

## Gongdin í USA

USA hevði risastórar oljukeldur, sum vóru grundarlag fyri búskaparliga vøkstrinum í tíðarskeiðinum frá byrjan til miðskeiðis av 1900-talinum. Men, sum vituligt er, oljukeldurnar vóru ikki ótøman±di, og í teim 48 statunum (Alaska og Hawaii ikki við) kom oljuframleiðslan í hæddina og hevði sítt maximum í 1970. Síðan 1970 hevur oljuframleiðslan minkað ár um ár. So, nýggjur boriteknikkur og nýggj kanningartól serliga á seimiska økinum hava ikki megnað at vent gongdini. Í 1970 innflutti USA ein triðing av oljuni. Í dag er innflutningurin 60% av nýtsluni, og um 20 ár verður talið helst 70% ella meir.

## Hvat kann bøta um støðuna, - ella gera hana verri?'

Allar framskrivingar eru óvissar, og byggja á fortreytir og metingar, sum kunnu vísa seg at vera skeivar. Ting sum kunnu gera oljuframleiðsluna størri enn væntað:

- Stovnarnir, sum gera hesar framskrivingar, kunnu enn eina ferð hava verið ov pessimistiskar.
- Nýggj "super giant"